## Lógir og reglugerðir serstaka byggisamtykt nr. 7

Serstaka byggisamtykt nr. 7 fyri ein part av Tórshavnar kommunu -
økið millum Hoyvíksvegin og Yviri við Strond

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, frá 21. Mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. Grein.

### GR. 1 ØKI BYGGISAMTYKTARINNAR

Økið er avmarkað sum sýnt er á viðfesta kortskjali og røkkur um hesi matr. nr.:

456 h 456 f 456 i 457 c 457 h 457 i 492 a, 518 ak 518 al 518 ao 518 ap 518 aq 518 ar 518 as, 519 c 519 d 519 e 519 f 520 525 d 525 e, 645 z 645 y 645 x 645 ab 646 b 646 c 646 d, 647 i 647 k 647 l 647 m 647 n 648 a 648 b, 649 g 649 h 649 i 649 k 649 l 649 m 649 n, 649 ad 649 ae 649 af 649 ag 649 ah 649 ai 649 ak, 492 b 492 e, 518 at. 525 f, 646 e, 648 c, 649 o, 649 al.

518 au, 525 n, 646 f, 648 d, 649 p, 649 am, 492 f, 518 av, 525 o, 646 g, 648 e, 649 r, 649 an, 492 l, 518 ax, 525 p, 646 h, 648 f, 649 s, 649 ao, 492 m, 518 ay, 525 q, 646 i, 648 g, 649 t, 649 ap, 518 b, 518 az, 645 d, 646 m, 648 h, 649 u, 649 aq, 518 c, 518 aæ, 645 f, 646 n, 648 i, 649 v, 649 ar, 518 d, 518 aø, 645 i, 646 o, 648 k, 649 x, 649 as, 518 e, 518 ba, 645 h, 646 p, 648 l, 649 y, 649 at, 518 f, 518 bb, 645 r, 647 a, 648 m, 649 z, 649 au, 518 g, 518 bc, 645 s, 647 d, 649 a, 649 æ, 649 av, 518 h, 518 bd, 645 t, 647 e, 649 b, 649 ø, 649 ax, 518 i, 518 bg, 645 u, 647 f, 649 c, 649 aa, 649 ay, 518 u, 518 bk, 645 v, 647 g, 649 d, 649 ab, 649 az, 518 v, 519 a, 645 w, 647 h, 649 f, 649 ac, 649 aø, 649 ba, 649 ch, 653 e, 666 b, 672 e, 677 m, 680 d, 649 bb, 649 ci, 653 f, 667 b, 672 f, 677 n, 680 e, 649 bc, 649 ck, 653 g, 667 c, 672 g, 677 o, 680 f, 649 bd, 649 cl, 653 h, 667 d, 672 k, 677 p, 680 g, 649 be, 649 cm, 653 i, 667 e, 672 l, 677 q, 680 h, 649 bf, 649 cn, 653 k, 668 b, 672 m, 678 a, 680 i, 649 bg, 649 co, 653 l, 668 c, 673 a, 678 b, 680 k, 649 bh, 649 cp, 653 m, 668 d, 673 b, 679 a, 680 l, 649 bi, 649 cr, 654 b, 670 a, 673 c, 679 c, 680 m, 649 bk, 649 cs, 654 c, 670 d, 673 d, 679 d, 680 n, 649 bl, 649 ct, 654 d, 670 e, 673 e, 679 e, 680 o, 649 bm, 649 cu, 654 e, 670 f, 673 f, 679 f, 680 p, 649 bn, 649 cv, 654 f, 670 g, 673 g, 679 g, 680 q, 649 bo, 649 cx, 657 b, 670 h, 673 h, 679 h, 680 r, 649 bp, 649 cy, 657 c, 670 i, 673 i, 679 i, 680 s, 649 bq, 649 cø, 657 d, 670 k, 673 k, 679 k, 680 t, 649 br, 649 cæ, 658 b, 670 l,

673 l, 679 l, 680 u, 649 bs, 649 cz, 658 c, 670 m, 674, 679 m, 680 v, 649 bt, 649 db, 658 d, 670 n, 675 a, 679 n, 680 w, 649 bu, 651 a, 659, 670 o, 676, 679 o, 680 x, 649 bv, 651 d, 660 b, 670 p, 677 a, 679 p, 680 y, 649 bx, 651 e, 661 b, 670 q, 677 c, 679 q, 680 z, 649 by, 651 m, 663 a, 670 r, 677 d, 679 r, 682 a, 649 bz, 651 n, 663 b, 670 s, 677 e, 679 s, 682 b, 649 bæ, 651 o, 663 c, 670 u, 677 f, 679 t, 682 c, 649 bø, 652 b, 663 d, 670 t, 677 g, 679 u, 682 d, 649 cd, 653 a, 664, 670 x, 677 h, 679 v, 682 e, 649 ce, 653 b, 665 b, 670 y, 677 i, 679 w, 682 f, 649 cf, 653 c, 665 c, 671 b, 677 k, 680 a, 682 g, 649 cg, 653 d, 666 a, 672 d, 677 l, 680 b, 682 h, 682 i, 683 u, 684 k, 687 f, 689 h, 695 o, 705 u, 682 k, 683 v, 684 l, 687 g, 689 i, 701 e, 705 v, 682 l, 683 x, 684 m, 687 h, 690 a, 702 a, 705 x, 682 m, 683 y, 684 n, 687 i, 690 b, 702 b, 706 b, 682 n, 683 z, 684 o, 687 k, 690 c, 702 c, 706 c, 682 o, 683 æ, 684 p, 688 a, 690 d, 702 d, 706 d, 682 p, 683 ø, 685 a, 688 b, 690 g, 702 e, 706 e, 682 q, 683 aa, 685 b, 688 c, 690 h, 703 b, 706 f, 682 r, 683 ab, 685 c, 688 d, 690 l, 703 c, 706 g, 682 s, 683 ac, 685 d, 688 e, 690 m, 703 d, 706 h, 682 t, 683 ad, 685 e, 688 f, 690 n, 704 a, 706 i, 682 u, 683 ae, 685 f, 688 g, 690 o, 704 b, 706 k, 682 v, 683 af, 685 g, 688 h, 691 b, 705 a, 706 l, 682 x, 683 ag, 685 h, 688 i, 691 c, 705 b, 706 m, 683 b, 683 ah, 685 i, 688 k, 691 e, 705 c, 706 n, 683 c, 683 ai, 685 k, 688 l, 691 f, 705 d, 706 o, 683 d, 683 ak, 685 l, 688 m, 692, 705 e, 706 p, 683 f, 683 am, 685 p, 688 n, 694, 705 f, 706 r, 683 g, 683 an, 685 q, 688 o, 695 a, 705 g, 706 s, 683 h, 683 ap, 685 r, 688 p, 695 b, 705 h, 706 t, ,683 i, 683 aq, 685 s, 688 q, 695 c, 705 i, 706 u, 683 k, 683 ar, 685 t, 688 r, 695 d, 705 l, 707 a, 683 l, 684 a, 685 u, 688 s, 695 e, 705 m, 707 b, 683 n, 684 c, 685 v, 689 a, 695 g, 705 n, 708, 683 o, 684 d, 686 a, 689 b, 695 h, 705 o, 710 b, 683 p, 684 e, 686 b, 689 c, 695 i, 705 p, 710 c, 683 q, 684 f, 686 c, 689 d, 695 k, 705 q, 710 d, 683 r, 684 g, 687 a, 689 e, 695 l, 705 r, 710 i, 683 s, 684 h, 687 b, 689 f, 695 m, 705 s, 710 k, 683 t, 684 i, 687 c, 689 g, 695 n, 705 t, 711 a, 711 b, 1293 e, 1324 æ, 711 d, 1295 a, 711 e, 1302, 712, 1303 a, 713 a, 1303 b, 713 b, 1304 a, 713 d, 1304 b, 714 b, 1304 c, 714 m, 1304 d, 714 n, 1305, 1053, 1310, 1054, 1311, 1055, 1312 a, 1056 a, 1312 b, 1056 b, 1313 a, 1056 c, 1313 b, 1056 d, 1314, 1056 e, 1315, 1056 f, 1316 a, 1056 g, 1316 b, 1056 h, 1317, 1056 k, 1318 a, 1056 l, 1318 b, 1056 m, 1318 c, 1057 a, 1319 a, 1057 c, 1319 b, 1287, 1320, 1293 b, 1321, 1293 c, 1322, 1293 d, 1323.

Partar av matr. nr. 456 a, 492 k, 518 a, 525 a, 526 b, 645 a, 657 a, 658 a, 660 a
661 a, 665 a, 668 a, 671 a, 672 a, 672 b, 1306, 335 litra cm og cp

Umframt litr. "bt", "ck", "ed", "el", "eæ", "ez", "fe", "fp"
Og partur av litra "eo"

alt í Tórshavnar kommuna og eisini um allar jarðarlutir, sum eftir 1. November 1983 verða frábyttir nevndu ognum.

## GR. 2 NÝTSLA ØKISINS

Økið verður sundurbýtt í eindirnar A1 og A2, B1, B2, B3 og B4, C1, C2 og C3, D, E og F, sí kortskjal 1

### Eindirnar A1 og A2, Sethúsabygging.

a. Við teimum undantøkum, ið eru nevnd niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg. Á hvørjari ogn kunnu ikki verða bygd uttan eini sethús, við í mesta lagi tveimum íbúðum.

b. Eftir nærri góðkenning býráðsins kann í eindini A1 verða loyvt at gera handlar, ið neyðugur eru til dagligu útgerð býlingsins.

### Eindirnar B1, B2, B3 og B4, Raðhúsabygging.

Við eimum undantøkum ið nevnd eru niðanfyri undir felagsásetingum, skulu eindirnar ikki verða nýttar uttan til bústaðir, og bygd mugu, einans verða tvíhús, raðhús ella teimum líkar bústaðir.

### Felagsásetingar fyri eindirnar A og B.

a. Á eindunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi, ristingum ella við útsjónd síni ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann verða eimum, sum uttan búgva til ampa.

b. Á ognunum er loyvt at hava tílíkt virki, sum vanliga verða útint á sethúsum, táið virki verður rikið av tí, sum á ognini býr, og tá ið býráðið heldur, at tað kann verða rikið uttan at broyta eyðkenni húsanna sum sethús ella spilla dámin á býlingunum sum sethúsabýlingur (herímillum við skeltum og tílíkum), ella at virkið ikki er gronnunum til ampa ella krevur rúmd at seta bilar á, sum ognin ikki hevur. Annars er ikki loyvt at nýta ognirnar til nakað slag av vinnuvirki. uttan so er, at virkið lýkur treytirnar í 1. petti, skal har soleiðis ikki verða bygt til ella útint handils-, bilkoyringar-, verksmiðju-, verkstaða - ella goymsluvirki.

c. Á eindini kunnu verða uppsettar spennbroytilstøðir og høvuðskifting fyri telefon til dagligar veitingar til býarpartin, tá ið víddin undir teimum er ikki meria enn 30 m2, og hæddin er ikki meir enn 3 m yvir jørð, og tá ið sniðið er í samsvari við hina byggingina.

## Eindirnar C1, C2, C3 og C4, Almenn endamál.

Eindirnar kunnu bert verða nýttar til almenn nedamál.
C1 verður lagt sum almenningur.

C2 er skipað í tveir høvuðspartar og verður lagt sum almenningur við skúla og honum neyðug ítróttarøki. Skúlabygningar verða lagdir á tí eystara partinum.

C3 verður lagt sum almenningur við loyvi til bygningar til almenn endamál, felags- og samkomuhøli, heruppí privatskúla.

## Eind D: Atvinnuøki.

Eind D kann einans verða nýtt til størri vinnuvirki, verksmiður og tílíkt og til virksemi, ið hevur samband við hetta.

## Eind E:

Økið verður kannað almennum endamáli.

## Eind F:

Økið verður kannað miðstaðaendamálum, skrivstovuendamálum, heilsuendamálum o.t. og til virksemi, ið hevur samband við hetta.

## GR. 3. VEGIR.

**a.** Lendi verður avlagt til hesar vegir og gøtur, ið ganga sýnt á fylgiskjali I:
Vegirnar i-k-l og m-n-o verða umlagdir og breiðkaðir til breiddar..................10,0 m
Vegurin h-n verður lagdur til breiddar...........................................................10,0 m
Aðrir størri vegir (grannalagsvegir) verða umlagdir og breiðkaðir til breiddir 10,0 m
Húsavegir, stytri enn 100 m kunnu tó verða lagdir til breiddar......................... 8,0 m
Gøtur verða lagdar til breiddar ........................................................................ 2,0 m

**c.** Til teir vegir, ið sambært pkt. a, verða lagdir 12,5 m breiðir, skal atgongd ikki verða fyri koyrandi og aðra ferðslu frá atliggjandi ognum, uttan so at eingin onnur atgongd kann fáast.

**d.** Byggilinjur

Fram við teimum sambært pkt. a. 12,5 m breiðu vegunum verður áløgd byggilinja 5 m frá marki til veg.

**e.** Leiðingar skulu sum meginregla verða lagdar sum sýnt á leiðbeinandi kortskjali II, ið er til skjals á teknisku deild býráðsins.

## GR. 4. ÚTSTYKKINGAR.

**a.** Útstykkingar innan samtyktarøkið kunnu bert verða gjørdar soleiðis, at tær í høvuðsheitinum samsvara við tað, sum sýnt er á fylgiskjali I.
Fyri økið norðanfyri vegin m-n-o er fylgiskjal 2 vegleiðandi. Fyri B-eindirnar skulu útstykkingarætlanir gerast í samsvari við tær byggiætlanir, ið áleggjast sambært GR. 5, eindirnar B.
Innan D-eindina verður útstykking einans loyvd, um hon hóskar við eina útstykkingarætlan, sum byggimyndugleikarnir hava góðkent fyri økið.

**b.** Einki grundstykki má verða minni til víddar enn:
Innan eindina A1 ............................................ 400 $m^2$
Innan eindina A2 ............................................ 500 $m^2$
Innan eindirnar B............................................ 300 $m^2$
Innan eindirnar D......................................... 2.000 $m^2$
Fyri eind F er galdandi at sundurbýti verður einans loyvt, um tað hóskar við byggiskipan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri alla eindina.

## GR. 5. BYGGING, STØDD, SKAPILSI OG STAÐFESTING HÚSANNA o.a.

Eindirnar A. Stakhúsabygging

Ognirnar norðanfyri og eystanfyri puntastrikuna p-q á fylgiskjali nr. 1, koma undir leiðbeinandi byggiskipan.

1. Á ognum, har álagt er byggiskipan, er galdandi:
   a. Nettonýtslustigið má ikki fara upp um 0,3.
   b. Hús mugu í mesta lagi verða bygd í einari hædd við kjallara og nýttum lofti.
   c. Kjallaraloftið má ikki vera meria enn 1,0 m oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Er hæddarmunurin minni enn 1,0, roknað frá hægsta til lægsta jørðildi, við húsahorn, kann kjallaraloftið liggja upp til 1,5 m frá hægsta jørðildi. Bert ein kjallari má vera.
   d. Á Hvørjari ogn skal avleggjast øki til í minsta lagi 2 bilpláss.

2. Á ognunum, har ikki er álagt byggiskipan, er galdandi:
   a. Byggistigið má ikki fara upp um 0,25.
   b. Hús mugu í mesta lagi verða bygd í einari hædd við kjallara og nýttum lofti.
   c. Hæddir til yvirsyll frá ávíkavist hægsta og lægsta jørðildi móti húsagrundini mugu ikki verða hægri enn at báðar tær nevndu hæddirnar samanlagdar verða í mesta lagi 8,0 m.
   d. Húsini skulu hava vanliga reising við skjøldrum. Reisingin skal vera millum 15°- 45° reyst.
   e. Á hvørjari ogn skal avleggjast øki til í minsta lagið 2 bilpláss.

## Eindirnar B: Raðhúsabygging

Bygt má einans verða í samsvari við góðkendari heildarbyggiætlan fyri hvørja B-eind ella náttúrligan part av henni.

## Eindirnar C: Almenn endamál

a. Nýslustigið fyri bygging til stovnar innan C-eindirnar má ikki fara upp um 0,3 fyri náttúrliga avmarkað øki.
b. Byggistigið má ikki fara upp um 0,25

## Eind D: Vinnuvirki x)

a. Byggistigið má ikki fara upp um 0,5
b. Rúmmálið í bygninginum má ikki fara upp um 3 m2 fyri hvønn m2 av grundøki.

c. Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 12 m frá meðaljørðildi (meðal við húsahornini).

d. Óbygd øki skulu við grasi, steinseting, asfalti e.t. verða hildin í hampuligum standi eins og ansast skal eftir, at uttanhýsins goymlsur av tilfari, ruski o.ø. verður skipað soleiðis, at tað ikki er til misprýðis. Verður ikki gjørt eftir hesum kann býráðið fyri rokning virkisins fáa viðurskiftini í rætt lag.

Eind E:

Nýtslustiðið má ikki fara upp um 0,3.

Eind F:

Byggistigið má ikki fara upp um 0,4 og nýtslustigið ikki upp um 0,5 roknað fyri eindina sum heild.

GR. 6: HVUSSU HALDAST SKAL BYGGISAMTYKTINA

Áðrenn farið verður undir at byggja ella broyta fyrrverandi nýtslu av eini ogn, skulu fyri býráðið verða lagdar tekningar, ið sýna grundina og umhvørvi hennara, og hvussu húsini standa á grundini, stødd teirra, snið og innrætting, eins og upplýsingar skulu verða givnar um, hvat húsini og grundin ætlast nýtt til, so at býráðið kann ansa eftir, at gjørt verður eftir byggisamtyktini.

GR. 7: BYGGING IÐ ER

Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi løglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við løgligari nýtslu av eini ogn. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um ella taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

---

**x)** Vart verður gjørt við, at umsóknir um bygging innan 300 m frá veðurstøðini krevja nærri viðgerð, samanber skriv frá
Meteorologisk Institut til Tórshavnar býráð, dagsett 19.3.1973

| UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 24/21434 |
| Ætlanarskriv: | |
| Góðkent: | 20-11-2024 |
| Váttað: | |




A1: Lág bústaðarbygging/smáhandil
A2: Lág bústaðarbygging
B1: Raðhúsabygging
B2: Raðhúsabygging
B3: Raðhúsabygging
B4: Raðhúsabygging
C1: Almenn endamál
C2: Almenn endamál
C3: Almenn endamál
D: Atvinnuøki
E: Almenn endamál
F: Miðstaðaendamál
Gøtur
Linja p-q
Byggilinja

# SERSTØK BYGGISAMTYKT:

# Nr 7

Fyri ein part av Tórshavnar kommunu - øki millum Hoyvíksvegin og yviri við Strond

Seinast broytt 15.04.2024